Bogi Hansen, havlívfrøðingur:

# Ráðstevnan hevur eydnast ógvuliga væl

**– Við ráðstevnuni í Føroyum er hesin parturin av arbeiðnum liðugur, men vit vóna, at kanningarnar kunnu halda fram, sigur Bogi Hansen**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bogi Hansen, havlívfrøðingur, sum er føroyska andlitið inneftir og úteftir, tá ið ræður um havstreymar og veðurlagsbroytingar, hevur havt úr at gera seinastu dagarnar, nú stór ráðstevna er í Føroyum.

Ráðstevnan, sum ber heitið ”Arctic – Subarctic Ocean Fluxes”, stytt ASOF, er endin á eini langari kanningarrøð, sum hevur havt til endamáls at kanna havstreymarnar millum Atlantshavið og arktisku havøkini norðanfyri okkum.

### Føroysk luttøka

Ikki færri enn 75 serfrøðingar úr 13 ymiskum londum eru í Føroyum í hesum døgum, og tað er Fiskirannsóknarstovan, sum skipar fyri ráðstevnuni í Føroyum.

Fiskirannsóknarstovan hevur tikið lut í kanningunum um havstreymarnar, og tað er felags evropeiski granskingargrunnurin, sum hevur stuðlað føroysku luttøkuni.

Kanningarnar eru annars fíggjaðar úr evropeiskum og norðuramerikanskum granskingargrunnum.

### Gingið væl

Bogi Hansen, havlívfrøðingur, sigur í stuttari viðmerking í morgun, at ráðstevnan í Føroyum hevur gingið ógvuliga væl.

– Ætlanin var, at talið av serfrøðingum á ráðstevnuni skuldi vera 80, men nøkur avboð komu, soleiðis at talið liggur um 75.

Hann sigur, at teir tríggir norðmenninir, sum halda almennu fyrilestrarnir, Svein Østerhus, Helge Drange og Harald Loeng, allir eru við sum ætlað.

– Við ráðstevnuni í Føroyum er hesin parturin av kanningararbeiðnum liðugur, men vit vóna, at kanningarnar kunnu halda fram, sigur Bogi Hansen.

### Rannsóknarskip

Um dagarnar hevur nýggja týska rannsóknarskipið, ”Merian”, ligið á Havnini og maðurin, sum verður ”sjefur” umborð á komandi túri, týskarin Meincke, er eisini við á ráðstevnuni í Føroyum.

Í Føroyum skiftir ”Merian” ein part av manningini og fer væntandi av aftur Havnini einaferð í vikuskiftinum.

Skrivari í ASOF og á ráðstevnuni í Føroyum er italska kvinnan, Roberta Boscolo, sum annars arbeiðir í Spaniu.



*Bogi Hansen fer í fyrilestri í annaðkvøld at greiða frá, hvørja ávirkan veðurlagsbroytingar fáa á lív og fiskiskap á Føroyagrunninum. Undir liðini á honum situr skrivarin á ráðstevnuni, Roberta Boscolo*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Veðurlagsbroytingar:

# Kunnu fáa stórar avleiðingar fyri Føroyar

**- Vandi er fyri, at veðurlagsbroytingarnar kunnu fáa rákið av heitum sjógvi at vikna, og tað kann fáa ógvuliga stórar avleiðingar fyri okkara havleiðir, heldur Bogi Hansen**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sambandi við vísindaligu ráðstevnuna, ASOF, sum er í Føroyum í hesum døgum, vórðu tveir fyrilestrar hildnir í Norðurlandahúsinum mikukvøldið. Fyrilestrarhaldarar vóru norðmenninir, Svein Østerhus og Helge Drange.

Fríggjakvøldið fer aftur ein norðmaður, Harald Loeng, at halda fyrilestur, og síðan fer okkara, Bogi Hansen, havlívfrøðingur, á pallin.

Bogi fer at greiða frá spurninginum, hvørja ávirkan veðurlagsbroytingarnar kunnu fáa á lív og fiskiskap á Føroyagrunninum.

### Ávirka náttúruna

Tey komandi 100 árini er væntandi, at veðurlagið á jørðini fer at broytast nógv.

– Jørðin sum heild er longu hitnað, og hetta fer at versna. Eisini onnur veðurfyribrigdi enn hiti fara at broytast. Hetta merkir, at plantur og djór á landi og sjógvi fara at hava øðrvísi umstøður at liva undir.

Bogi Hansen heldur tað vera ógvuliga torført at spáa um, júst hvussu broytingarnar fara at ávirka náttúruna og tær vinnur, eitt nú fiskiskap, sum eru tengdar at náttúruni.



*– Á Føroyagrunninum eru serliga tvey viðurskifti sum gera umstøðurnar hjá okkum heilt serligar og viðbreknar. Eitt er, at vit liggja umgyrd av heitum sjógvi – og hitt er gróðurin, sigur Bogi Hansen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Heitur sjógvur

– Á Føroyagrunninum eru serliga tvey viðurskifti sum gera umstøðurnar hjá okkum heilt serligar og viðbreknar. Tað fyrsta er, at vit liggja umgyrd av heitum sjógvi, sum ferðast úr Atlantshavi norðureftir og eystureftir.

Bogi Hansen sigur, at hetta er høvuðsorsøkin til, at sjógvurin um okkara leiðir er nógv heitari enn vanligt er aðrastaðni á sama breiddarstigi.

– Men vandi er fyri, at veðurlagsbroytingarnar fáa hetta rákið av heitum sjógvi at vikna – og hetta kann fáa ógvuliga stórar avleiðingar fyri okkara havleiðir, heldur hann.

### Skiftandi gróður

Havlívfrøðingurin sigur, at tað næsta, ið sermerkir Føroyagrunnin, er, at gróðurin er so skiftandi – frá einum ári til annað.

– Tey góðu árini er gróðurin nógvar ferðir meira enn tey vánaligu. Gróðurin er tað, sum fiskur og onnur djór hava at liva av. Tí eru møguleikarnir fyri fiskiskapi heftir at gróðrinum, sum aftur er heftur at veðurlagnum.

Bogi vísir á, at hitin í luftini teir fyrstu mánaðarnar av árinum eisini tykist hava stóran týdning, og helst hevur vindurin hesa árstíðina eisini nógv at siga.

### Føroyar viðbreknar

– Enn eru hesi viðurskifti ov lítið kannað til, at nakað kann sigast við vissu um, hvussu lívið á Føroyagrunninum og fiskiskapurin fara at merkja tær komandi veðurlagsbroytingarnar.

Bogi Hansen væntar tó, at Føroyar eru meira viðbreknar enn flestu onnur lond, hvat hesum viðvíkur.